# Norðurlendingar fáa avleggar frá Yggdrasil

**Í gjár byrjaði bólkurin Yggdrasil við m.ø. Kristian Blak og Eivør Pálsdóttur eina tónleikaferð í norðurlondum og Estlandi**



Yggdrasil er træið millum heims og heljar í norrønu gudalæruni, og Yggdrasil er somuleiðis ein av teimum bólkunum við rótfesti í Føroyum, sum man hava ferðast eina mest. Ofta hevur bólkurin nevniliga verið mannaður av norðurlendskum tónleikarum. Í gjár byrjaði Yggdrasil eina tónleikaferð í norðurlondum.

Við í bólkinum eru Eivør Pálsdóttir, sang, Heðin Ziska Davidsen, guitar, Kristian Blak, klaver, Mikael Blak, bass, Brandur Jacobsen, trummur, og Anders Hagberg, saxofon og floyta.

Eftir at hava spælt í Danmark í gjárkvøldið, spælir Yggdrasil á Norðurlendska Fólkaháskúlanum í Kungälv í Svøríki í kvøld, og í hesum sambandi kemur væntandi ein stór grein um tey í svenska blaðnum Dagens Nyheter fríggjadagin.

Síðani gongur leiðin til Álands, har fyrrverandi musikkskúlalærerin í Vágum, Stefan Simonsen, sum nú er leiðari á Nordisk Institut, tekur ímóti. Etir hetta verður farið til Estlands, har bólkurin verður í tríggjar dagar. Mikudagin verður spælt í Turku í Finnlandi, og fríggjadagin í næstu viku spælir ein kvartett úr Yggdrasil í Føroyahúsinum í Keypmannahavn.

Ein part av tónleikinum hava millum onnur Heðin og Eivør gjørt. Heðin er eisini í holt við at leggja seinastu hond á eina plátuútgávu, sum skal ljóðblandast í Svøríki.

Nomus, Mentamálaráðið og Mentunargrunnurin hava stuðlað Yggdrasil, og vegna bólkin sigur Kristian Blak seg fegnast um, at eisini útbreiðsla sum turnévirksemi verður styðjað.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Um morgunin skrið ella stormur av útsynningi, um middagsleitið gul av ymsum ættum. Ælingur og hitin millum 6 og 9 stig. Um kvøldið hvassur vindur av útnyrðingi og kavaælingur og hitin um frostmarkið.

**Veðrið**




**hósdagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi, Seinnapartin hvassur vindur av útsynningi. Stundum regn og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrst gul til stívt andøvsgul av ymsum ættum og ælingur. Hitin um 6 stig. Út á seinnapartin skrið ella stormur av norði og kavaælingur. Hitin fellur niður til frostmarkið.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men sunnudagin upp í ein strúk av eystri og møguliga kavaælingur. Hitin um frostmarkið.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | 0 |
| Qaqortoq | ÷2 |
| Ammassalik | ÷4 |
| Saint John's | ÷5 |
| Halifax | ÷5 |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 10 |
| Tromsø | ÷11 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | ÷10 |
| Moskva | ÷11 |
| Berlin | 1 |
| Warzawa | ÷1 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | ÷10 |
| Paris | 2 |
| Madrid | 1 |
| Róm | 6 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 9 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 11 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 3 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | – |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 32 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 967 hPa við Vestur-Noreg hvørvur eystureftir. Eitt djúpt lágtrýst, 962 hPa í útsynning úr Íslandi verður yvir Føroyum mikudagin.




Lágtrýstið yvir Føroyum fer í landnyrðing og hevur eitt skifti høgættastorm við sær.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 13/01 kl. 06[00]– 14/01 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,5°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 19,0 mm – mált frá 13/01 kl. 06[00]–14/01 kl. 06[00]
Avfallið higartil í januar: 40,8 mm




**Vika 2 – 12. januar**

1. Centrum:
**03 - 21 - 60 - 46 - 72 - 04 - 02 - 52 - 50 - 65 - 37 - 17 - 19 - 42**

1. Ramme:
**35 - 05 - 23 - 28 - 18 - 58 - 01 - 66 - 36 - 48 - 75 - 08 - 20 - 69 - 09 - 53 - 41 - 49 - 63 - 10**

Fuld plade:
**55 - 57 - 67 - 30 - 29 - 61 - 45 - 25 - 38**

Fri spil: **BO__N**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **421.315,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **72.665,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **4.065,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **2.451,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **35,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

10. jan.: Fyrra kvarter
11. jan.: Mánin longst frá jørðini
18. jan.: Fullmáni
23. jan.: Mánin næstur jørðini

Kelda: Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. jan | 04.03 | 16.26 | 03.03 | 15.26 | 03.18 | 15.41 | 06.03 | 18.26 | 07.03 | 19.26 | 02.18 | 14.41 | 01.18 | 13.41 | 04.18 | 16.41 | 05.18 | 17.41 | 03.48 | 16.11 | 05.03 | 17.26 |
| 16. jan | 04.49 | 17.14 | 03.49 | 16.14 | 04.04 | 16.29 | 06.49 | 19.14 | 07.49 | 20.14 | 03.04 | 15.29 | 02.04 | 14.29 | 05.04 | 17.29 | 06.04 | 18.29 | 04.34 | 16.59 | 05.49 | 18.14 |
| 17. jan | 05.40 | 18.04 | 04.40 | 17.04 | 04.55 | 17.19 | 07.40 | 20.04 | 08.40 | 21.04 | 03.55 | 16.19 | 02.55 | 15.19 | 05.55 | 18.19 | 06.55 | 19.19 | 05.25 | 17.49 | 06.40 | 19.04 |
| 18. jan | 06.29 | 18.53 | 05.29 | 17.53 | 05.44 | 18.08 | 08.29 | 20.53 | 09.29 | 21.53 | 04.44 | 17.08 | 03.44 | 16.08 | 06.44 | 19.08 | 07.44 | 20.08 | 06.14 | 18.38 | 07.29 | 19.53 |

5 707265 100036 >